## Jógvan við Keldu vil sleppa at gjalda

**Føroyar sleppa ikki at valda í Norðurlandaráðnum, og tí sleppa vit heldur ikki at gjalda. Jógvan við Keldu heldur fyrimunirnar vera so stórar, at vit eisini at eiga at rinda okkara part, men danski samstarvsráðharrin helt, at hetta skal síggjast í síni heild**

NORÐURLANDA-RÁÐIÐ
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Føroyar hava egna luttøku við fullum atkvøðurætti at játta pening úr norðurlendsku fíggjarætlanini. Men tað kennist skeivt og niðrandi, at vit ikki sleppa at rinda okkara part, heldur Jógvan við Keldu úr Fólkaflokkinum, sum umboðar løgtingið í Norðurlandaráðnum.

Nú líkt er til, at vit ikki fáa fullan limaskap í bræði, spurdi Jógvan við Keldu á Norðurlandaráðsfundinum, um ein skipan kann gerast, so føroyingar sleppa at gjalda.

– Er ongin fyribilsskipan, sum kann geva føroyingum loyvi at rinda sín egna part av útreiðslunum? Um tað ikki ber til sambært Helsinki-avtaluni, kunnu vit so ikki gera eina skipan við onkrari millumrokning við Danmark, spyrdi Jógvan við Keldu.

Danski samstarvsráðharrin, Flemming Nielsen, var eitt sindur paff av spurninginum.

– Tað er ógvuliga óvanligt, at tú hittur fólkum, sum vilja sleppa at rinda meira, enn tey gera frammanundan. Tað er ein heilt óvanlig politisk støða, segði Flemming Nielsen.

Hann helt, at málið mátti síggjast í síni heild, og har var greiða danska støðan, at Føroyar ikki hava fullan rætt til limaskap. Um tað skuldi skiljast, at so sleppa vit heldur ikki gjalda, hekk eftir í tí óvissa.

# Eingin stuðul úr Íslandi

**Uttan við stuðli frá Danmark verður helst vónleyst at søkja um sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum. Komandi íslendski formansskapurin virðir føroysku sjálvstýrisstrembanina, men fer ikki at seta seg upp ímóti Danmark**

NORÐURLANDARÁÐIÐ
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Føroyskur limaskapur í Norðurlandaráðnum ikki er sannlíkur, so leingi Føroyar ikki hava egna grundlóg. Tað tykist greitt eftir Norðurlandaráðsfundin, sum var mánadagin og týsdagin. Fitt av orku var nýtt til spurningin.

Anders Fogh Rasmussen forsætisráðharri var sjálvur fyrstur at taka málið upp. Hann vísti til, at Føroyar hava søkt um sjálvstøðugan limaskap. Men sjálvstøðugur limaskapur kemur ikki upp á tal.

– Danska stjórnin stuðlar føroysku ynskjunum um ein styrktan leiklut í norðurlendska samstarvinum, og vit eru sinnað at geva Føroyum og Grønlandi so sterkan leiklut, sum danska grundlógin loyvir, segði Anders Fogh Rasmussen.

Í hesum liggur, at danska grundlógin loyvir ikki sjálvstøðugum limaskapi, tí Norðurlandaráðið byggir á Helsinki-avtaluna, sum er ein fólkarættarligum sáttmáli millum statir.

### Uttan um Danmark

Føroyski varaløgmaðurin, sum umsitur norðurlandamál, førdi fram, at ynski um føroyskan limaskap byggir á eina einmælta løgtingssamtykt. Hann helt tíðina vera komna at søkja um limaskap, tí samstarvið altíð hevur verið millum fólk og tjóðir heldur enn millum sjálvstøðugar statir.

– Umsóknin snýr seg sostatt ikki um at kjakast við Danmark, men at Norðurlandaráðið tekur støðu til, um Norðurlandaráðið og norðurlendska ráðharraráðið eisini kunnu geva fólkum, sum ikki enn eru vorðin sjálvstøðugir statir, javnbjóðis limaskap í ráðnum. Vit vóna, at hetta kann vera viðgjørt og ikki so nógv annað, segði Høgni Hoydal.

Hann royndi sostatt at snúgva kjakið uttan um donsku sýtingina fyri at viðurkenna Føroyar sum javnsettan part í norðurlendskum samstarvi.

### Ráðharrar hveppast

Ísland verður landið, sum næstu árini fær formansskapin í Norðurlandaráðnum, og tað fekk Jóannes Eidesgaard, formann Javnaðarfloksins, at spyrja um íslendsku støðuna til føroyska ynskið um sjálvstøðugan limaskap.

Íslendski ráðharrin við norðurlandamálum, Siv Friðleifsdóttir, svaraði ikki beinleiðis, um hon stuðlaði Føroyum í ynskinum um fullan limaskap. Hon hevði skilt, at danska stjórnin helt tað vera ímóti donsku grundlógini, og tí hvepti hon seg við taka støðu.

– Eg haldi tað vera ógvuliga torført og viðbrekið at spyrja okkum ráðharrar um hetta. Men eg skilji, at tit gera tað. Eg havi stóra virðing fyri arbeiðnum í Føroyum fram ímóti sjálvstýri, men eg havi eisini stóra virðing fyri Danmark og teirra støðu. Eg fari tí ikki at leggja meg beinleiðis upp í kjakið, sum støðan er. Eg kann bara siga, at vit hava fingið eitt bræv á borðið, sum sigur, at tað stríðir ímóti grundlógini, og tá dugi eg ikki at síggja, hvussu vit kunnu blanda okkum upp íhetta, segði Siv Friðleifsdóttir.

Sostatt tykist greitt, at Føroyar fáa onga sjálvstøðuga luttøku í Norðurlandaráðnum fyrr enn danir loyva tí, og Ísland og onnur lond styðja heldur ikki føroyska ynskið, uttan at danir gera tað. Spurningurin skuldi viðgerast í samstarvsráðnum mikudagin.




*Ísland fer neyvan at stuðla einum føroyskum ynski um sjálvstøðugan limaskap, sigur Siv Friðleifsdóttir, sum leggur fram ætlanina hjá íslendska formansskapinum*

*Mynd: Lennart Perlenheim*

# Sjálvstøðugur limaskapur vrakaður

**So leingi Føroyar eru partar av danska ríkinum, kunnu vit ikki gerast sjálvstøðugur limur í Norðurlandaráðnum. Tað gongur greitt fram av svarinum, sum Anders Fogh Rasmussen forsætisráðharri hevur givið Anfinni Kallsberg løgmanni**

NORÐURLANDARÁÐIÐ
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Trupulleikin er enn einaferð, at føroyingar verða ikki viðurkendir sum tjóð sambært fólkarættinum. Vit hava ikki virkisføri sum statur, og Danmark loyvir okkum ikki at virka úteftir sum ein tjóð í fólkarættarligum høpi.

Norðurlandaráðið er eitt samstarv millum statir sambært Helsinki-avtaluni, og tí kunnu føroyingar ikki sleppa upp í part millum onnur sjálvstøðug lond. Trupulleikin er, at Danmark fólkarættarliga ikki kann umboðast á tveimum ymiskum frontum, tí vit eru partur av Danmark.

Sostatt verður umsóknin um sjálvstøðugum limaskap, sum eitt einmælt løgting annars samtykti at søkja um tann 18. marts 2003, ikki gingin á møti. Svarið frá Anders Fogh Rasmussen er fyrikomandi men noktandi.

»Det er generelt regeringens holdning at medvirke positivt til at styrke Færøernes og Grønlands inddragelse på udenrigsområdet. Regeringen ser en sådan øget indflydelse som et væsentligt element i udbygningen af samarbejdet inden for rigsfællesskabet. Regeringen vil derfor støtte de færøske ønsker om en styrket rolle i det nordiske samarbejde.

Dette må imidlertid ske inden for rigsfællesskabets rammer, efter hvilke Færøerne ikke kan blive konraherende part i Helsinki-aftalen samt traktater indgået for dennes rammer«, skrivar Anders Fogh Rasmussen í brævinum, sum dagfest 15. september. Føroyingar kunnu sostatt ikki virka sum ein sáttmálapartur, ið sjálvur ger avtalur við onnur lond.

Anders Fogh Rasmussen heldur, at ein góð loysn á trupulleikanum hevði verið, at tey fimm Norðurlondini gjørdu eina avtalu um ávísar batar av føroysku støðuni í norðurlendska samstarvinum.

> ” *Løgtingið samtykkir, at Føroyar eiga at søkja um fullgildugan limaskap í Norðurlandaráðnum við øllum rættindum og skyldum sambært Helsinki-sáttmálanum, harundir at Føroyar eisini gerast sjálvstøðugur avtalupartur í felags norðurlendskum sáttmálum, og heitir á landsstýrið um at taka øll neyðug stig í hesum sambandi.*
>
> *Løgtingssamtykt frá 18. mars 2003*





Føroya løgmaður
Tinganes
FO-110 Tórshavn
Føroyar

Vientiane 19. oktober 2003

**Góði løgmaður.**

Vit hava frætt, at politiski andstøðingurin, Ólavur Petursson, hevur verið illa píndur, meðan hann hevur verið í varðhaldi í landi tygara. Nógv bendir á, at henda píning er farin fram, tí Ólavur Petursson hevur aðra hugsan enn stjórnin í Føroyum. Vit vita eisini, at harra Petursson enn eina ferð er fongslaður og hevur sitið innibyrgdur síðan mai í ár, uttan at hann hevur verið fyri rættin.

Góði løgmaður! Vit vilja staðiliga mæla ímóti, at tygum lata slíkt fara fram í Føroyum. At hava og tora at gera vart við politiskar hugsanir er ein mannarættur, ið er galdandi fyri øll. Tí heita vit á tygum um at lata Ólav Petursson leysan alt fyri eitt. Øll hava rætt at hava egnar áskoðanir uttan at verða fongslað av órøttum og pínd: Eisini Ólavur Petursson og aðrir borgarar, ið hava verið illa viðfarnir av myndugleikunum, ið tygum sum løgmaður hava ábyrgdina av!

Vinaliga

Thao Yang
Luang Prabang Road 49
P.O. BOX 6977
Vientiane
Laos

... tíbetur er slíkt ikki veruleiki í Føroyum! Men tað er tað aðrastaðni í heiminum. Tí bjóðar Amnesty International í Føroyum tær at vera partur av heimsumfatandi átakinum, Skriva fyri lívi. Kom inn á heimasíðuna hjá Amnesty International í Føroyum og tekna teg til at Skriva fyri lívi. So fært tú trý teldubrøv um mánaðin, sum tú kanst skriva út og senda teimum, ið hava ábyrgdina av, at mannarættindi verða brotin. **Kom og skriva fyri lívi.**

amnesty.fo

VIÐ LOYVI FRÁ LØGMANNI